Savna góð minnir saman SSP

Góðu foreldur og næmingar í 7. flokkunum í Tórshavnar kommunu.

Sum ein liður í SSP- arbeiðinum á skúlunum og ungdómshúsunum, verða áhugaverdir SSP- dagar fyri allar 7. flokkar í kommununi 27. - 28. feb. 2020.

Evnið er " ung og lívið" og lyklaorðið verður: Sálarligur trivnaður, harundir vinalag og at tora at "standa ímóti bólkatrýst". Upplegg verður frá lærarum og SSP-lærarum. Næmingarnir arbeiða í bólkum. Eisini verður fyrilestur við Beintu Atladóttir og Lív Justinussen, sálarfrøðingar á fyribyrgingardeildini hjá Bláa Krossi Føroya. Sí https://www.blakross.fo og https://www.livlivid.fo/

Skráin sær soleiðis út:

Hósdagin 27. feb. frá 08.00-13:30: á egnum skúla. **Sí tó skránna við fyrilestrum**

Fríggjadagin 28. feb. frá 09:00- 13:30: Øll møtast í Badmintonhøllini í Gundadali kl. 09.00 og skulu tey vera ílatin eftir veðrinum, soleiðis at tey kunnu røra seg uttandura.

Fríggjadagin 28. Feb. frá kl. 20:00– 23:00: Ungdómsveitsla/konsert á Reinsarínum. Starvsfólkini frá ungdómshúsunum í kommununi skipa fyri og eru hjástødd alt kvøldið.

Skráin við fyrilestrum:

Hósdagin 27. feb. verður fyrilestur á skúlanum við Løgmannabreyt frá kl. 08:30-10:30 fyri 7. flokkum á skúlanum við Løgmannabreyt, Eysturskúlanum, Hoyvíkarskúla, Kollafjørð skúla, Nólsoyar skúla og Kaldbak. Næmingarnir møta á skúlanum á við Løgmannabreyt kl. 08:15.

Tit fáa nærri boð frá skúlanum um transport til og frá fyrilestrunum.

Næmingarnir hava matpakka og okkurt drekkandi við allir dagar.

Vinarliga heilsan

SSP- samstarvið í Tórshavnar kommunu